SOSIALURIN

Prentamiðjan á Høygabrøyt
tlf. 1828

Blaðstjórn:
Villi Sørensen, (ábyrgd)
tlf. 5479 — Klaksvík
Jákup Lindenskov
tlf. 2209 — Tórshavn

Handilin

VIT ERU so væl fyri, at vit hava heimsins bestu peningaskipan. Hetta er ikki væl í samljóð við tey trongu peningaviðurskifti, vit hava liðið undir nú í seinastuni; men kortini er hetta óreingiligur veruleiki.

BEINLEIÐIS lið í heimastýrislógini er hetta ikki, men ein avleiðing av teirri stýrisskipan, sum vit fingu fyri 20 árum síðan, og sum hevur roynst so mikið væl, at allir landsins flokkar hava arbeitt undir henni, og allir hava sagt frá, at meðan teir hava rátt fyri borgum, hava vit havt uppgongutíðir og framburð sum á ongum sinni áður.

TAÐ ERU so mong viðurskifti, ið spæla inn, tá talað verður um fíggjarpolitikk, og vit kenna frá mongum londum, hvussu torført tað er at greiða fíggjarmálini bæði innlendis og mótvegis útheiminum.

HER HAVA vit tann fyrimun, at okkara frælsispolitikkur, so leiðis sum hann er skrásettur í stevnu javnaðarmanna, hevur sigrað, og vit hava nomið úrslitini av honum í slíkan mun, at einki land er á leið við okkum á hesum øki.

ALLAN TANN pening, vit sjálvir vinna við sølu av okkara framleiðslu hava vit fult ræði yvir og kunnu brúka hann, soleiðis sum tað nú einaferð hóskar okkum best. Men vit hava handilsviðurskifti við lond, har vit einki selja til og sostatt ikki eiga gjaldoyra har, hóast vit hava stórvegis handilsskap at røkja við hesi lond.

VIT BYGGJA hópin av skipum í Noreg, og vit hava bygt skip aðrastaðni, har vit lítið og einki selja, men danski tjóðarbankin hevur greitt øll okkara gjaldoyrisviðurskifti móti hesum handilspartnarum okkara.

VIT KUNNU keypa alt, vit hava fyri neyðini í londum, har vit ikki sjálvir hava høvi til at gjalda við sølu av egnari fram leiðslu — hin frælsa peningaskipanin í samvinnu við danir tryggjar okkum líkindi fyri handlinum kortini.

VÍST ER tað rætt, at slíkur handil ikki altíð hevur lagað seg so væl; men hetta er úrslit av privata kapitalistiska handilsskapinum, har hvørkrandi bond forða fríum handli, tí inn- og útlendskir spekulantar tryggja sær ófrælst monopol — eink arrætt — til keyp og sølu.

HENDA beinskerjing og hesi hvørkratøk eru sjálvandi tjóðini, fólkinum, forbrúkaranum til miklan skaða, men her gerst einki, so leingi, vit byggja okkara handilspolitikk á kapitalistiska samfelagsgrundarlagnum.

LÝSING

Forvitnislig framsýning

- Varðin reistur á Áarvegnum við Hotel Hafnia
- Fólk nýta høvi til at keypa endurprentingina av Varðanum
- 1. og 2. bind er komið





Tíðarritið Varðin verður nú endurprentaður og tygum fáa um 8000 blaðsíður í 38 bindum av týðningarmesta lesnað sum komin er á føroyskum máli.

Latum okkum reisa Varðan aftur, so ótarnað framhald av tí týðningingarmikla menningararbeiði, sum Varðin hevur gjort hesi seinastu 50 árini, kann skipast aftur.

Prísurin er 20 krónur bindið.

Varðin í hvørt hús í Føroyum!

Javnaðarmaðurin ...

(Framhald frá 1. síðu.)

skuggasíðu og tørvaðu hjálp og bata.

Danbjørg var skúlalærari, og skúlin lá honum á hjarta sum ein hin størsta gávan til frígering frá fátækradømi og vesældømi, tí hann sá bjart og greitt, at góvu vit arbeiðara- og fiskimannabørnunum lærdóm og gjørdu tey búgvin at standa fyri og taka lut í øllum arbeiði á øllum lívsins øki, vildi tað ikki bara bera fjoldini, men øllum okkara fólki ljósari kor at liva undir her á hesum annars kørgu klettum.

Tú ert nú farin, tú ein av mínum bestu og trúgvastu vinum og stríðsfeløgum.

Sum formaður javnaðarfloksins takki eg tær hjartaliga, men fyrst og seinast takki eg tær sum vini og partamanni, ið stóð trúgvur og óvíkiligur ikki bara í logn, tá ið alt sýntist at anda við, men eisini tá ið ódnarhvirlur og óløgin sýntust at fara avstað við øllum tí, sum vit báðir høvdu fagnað og verið við til at stríðast fyri.

Takk, góði vinur.

Tú gavst mær, tínum kæru, konu og børnum, vinum og partamonnum hitt vakrasta fyri dømi.

Títt minni vil altíð lýsa vakurt ímillum okkum.

Pætur.

RÆTTING.

Tað er Lis Dam Guttesen sum hevur teknað kortið av Havnini og ikki Lis Dam Jacobsen, sum vit í seinasta blaði søgdu frá.

3700

ER NÝGGJA TELEFONNUMMAR OKKARA.

Ebba

FØROYA BANKI
banki FØROYA

Nú er lagamanni at koma á Ólavsøku

NÝGGJA HAVNARKORTIÐ ER KOMIÐ.
Spyrjið í bókabúðum og kioskum.

GRAFIA

Tann sterki, reini smakkurin er eitt serkenni fyri

RESTORFFS PILSNARØL

VØRUMESSAN
í Klaksvík 1968

FÆRØSK MARGARINE
Vita No 1
VITAMINISERET
FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

Summarfrítíð

Matrikulstovan er stongd frá 30. juli — 20. august.

Matrikulstjórin

Skula tit brúka bil

persónkoyring ella skúlakoyring, so snarið **tlf. 3456**

Alexander Dalfoss

Til viðskiftafólkið

Vegna ólavsøkuna senda vit ikki úrval hesa vikuna.

Jóan Jakku
Vágsbotnur, Tórshavn.